# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Øll børn vælkomin á barnasjónleikarastevnu

**Eru tit ein bólkur av børnum, eitt felag ella ein skúlaflokkur, og hava tit hug at spæla sjónleik, so teknið tykkum til barnasjónleikarastevnu í Havn leygardagin 5. mai**

SJÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Barnasjónleikarastevnan Stjørnueyga, sum verður í Havn leygardagin 5. mai, verður ein heilur dagur, sum verður rokaður við sjónleiki. Tá fer sjónleikur at seta dám á býin, bæði úti og inni, uppi og niðri.

MáF, sum skipar fyri stevnuni, væntar at eini 100 - 150 børn í aldrinum 9 til 14 ár úr øllum landinum fara at taka lut og spæla sjónleik allan dagin.

**Fimm pallar**

Ætlanin er hava einar fýra til fimm pallar, har børnini kunnu royna seg: Í Sjónleikarahúsinum, á Meiarínum, í Grasagarði, í Tinghúsgarðinum og møguliga eisini í Posthúskjallaranum.

**Teknið tykkum nú**

MáF heitir á allar bólkar, sum ætla at framføra, um at senda tekningarblað til Máf sum skjótast, so tey kunnu gera eina skrá.

- Eru tit ein bólkur av børnum, eitt felag ella ein skúlaflokkur, og hava tit hug at gera eitthvørt, so haldi tykkum ikki aftur, men komið við - tess fleiri tess stuttligari, sigur Máf. Felagið roknar við, at framførslurnar verða umleið 10-15 minuttir, og bjóðar felagið seg fegið at koma út at hjálpa og vegleiða áðrenn. Tekningarskjøl eru at fáa hjá MáF, Undir Pisuvarða 2, tlf. 315624, maf@maf.fo.









